

Tromsø: Mynd: Eva Meyer Hanssen

# Noreg gongur á odda í Arktis

**Jógvan Hugo Gardar**

11.09.2014 - 10:32

Oljan.fo

Í farnu viku bleiv Arctic Economic Council (AEC) stovnað á einum fundi í kanadiska Iqaluit. Hetta skal vera eitt búskaparligt ráð sum skal ganga á odda í royndunum at fáa meir vinnulív í gongd í Arktis.

Á fundinum luttóku umboð fyri øll átta arktisku londini, umframt umboð fyri upprunafólkabólkarnar í Arktis.

Gro Brækken, stjóri í Norsk olje og gass, sigur at havandi í huga góðu umrøðuna bæði lokalt og á altjóða pallinum, so er hetta samstarvið væleydnað. Hornasteinarnir í samstarvinum skulu vera olja og gass, maritimir vinnuvegir, ferðavinna og fiskivinna.

- Eg vóni at vit við hesum hava tryggja okkum at fólkið í Arktis hava nakað at liva av í framtíðini, samstundis sum man livir fyri Arktis, sigur Brækken.

Norski uttanríkisráðharrin, Børge Brende, segði á fundinum, at higartil hevur samstarvið í Arktis sett sjóneykuna á eina burðardygga framtíð og umhvørvið í Arktis.

- Við stovnanini av AEC fær vinnulívið eitt sjónligari pláss í framtíðini. Í Noregi hava vit jaligar royndir av at tætt samstarv millum politisku skipanina og vinnulívið hevur havt eina jaliga ávirkan. Hesar royndirnar verður nú møguligt at læra av, tí høvuðsskrivstovan hjá AEC skal liggja í Tromsø, sigur Brende.

Londini sum eru við í AEC eru somu londini sum eru limir í Arktiska ráðnum:Russland, Finnland, Svøríki, Ísland, Danmark, USA og Canada.